# Ein feit FØROYSK KENNING

**Í ár er møguleikin fyri eini føroyskari kenning á tjóðarhátíð okkara størri og betri enn nakrantíð áður**

Stutt fyri jól í fjør fingu føroyingar sín tjóðarsnaps, tá fyritøkan Dism við Mortan Mols Mortensen og Erling Eidesgaard á odda, fór undir at framleiða føroyskt rúsdrekka. Úrslitið var akvavitt, ið fekk navnið Lívsins Vatn.

Fyri góðum mánaði síðani kunngjørdu somu menn, at nú fekst Eldvatn. Eldvatn er vodka, framleitt úr føroyskum vatni til føroyingar.

At skola sterka løgin niður, hevur føroyingurin manga føroyska øl í at velja. Føroya Bjór framleiðir og selir hópin av ymiskum øli, og harvið eru møguleikarnir fyri at drekka sær eina reina føroyska kenning er størri og betri enn nakrantíð.

**Nossaheitur snapsur**

Men er tað nakað, ið er serføroyskt og hoyrir tjóðarhátíð okkara til, er tað sermerktar blandingar við einum heilt óvanligum temperaturi – ofta nevndur nossatemperaturur – bjóðaður úr lummafløsku.

Hóast tað ikki er til at vita, hvat tú fært í munnin, eru nakrir afturvendandi løgir, ið tú heilt víst fært bjóðað á ólavsøku.

Heitt Taffel Akvavitt, ein sonevndur reyður Aalborg, er tann mest vanligi. Ein variantur av hesum er at sleppa nakað av sitrónvatn í. Ikki tí, at tað verður betri av tí, men tað ger man bara.

Heitt og biligt ginn er somuleiðis tiltikið. Ein nýggjari drykkur er Baileys, hvørt løgur í høvuðsheitum er gjørdur á whiskey og róma, og fær hann ein ógvuliga undarligan og klumputtan konsistens av liggja í flógva vestalummanum. Famous Grouse og annað whisky í minni dýra endanum, eru eisini klassikarar.

Við øðrum orðum er tað danskasta akvavitti eins føroyskt og Lívsins Vatn á ólavsøku. Skál og góða ólavsøku!

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

| 2008: | | |
|---|---|---|
| Vín | 22.279 litrar | Kr. 1.492.305 |
| Spiritus | 19.596 litrar | Kr. 4.341.801 |
| Øl | 95.046 litrar | Kr. 2.411.091 |
| **2007:** | | |
| Vín | 18.999 litrar | Kr. 1.267.037 |
| Spiritus | 22.106 litrar | Kr. 4.551.510 |
| Øl | 105.441 litrar | Kr. 2.625.966 |



# Drekka fyri átta millíónir

**Smáir 100.000 litrar av øli, góðir 20.000 litrar av víni og smáir 20.000 litrar av spiritusi. So mikið leggja føroyingar inn undir seg upp undir ólavsøku**

**»Skál og góða ólavsøku!« Á ólavsøku verður drukkið, og tað verður drukkið nógv. Við festivalum bæði fyri og eftir ólavsøku er ilt at siga, hvussu nógv fólk drekka júst á ólavsøku, men Rúsdrekkasøla Landsins hevur gjørt eitt yvirlit yvir, hvat og hvussu nógv løgdu undir seg, tær báðar tvær vikurnar fyri tjóðarhátíð okkara í fjør.**

## Selja fyri átta millíónir

Rúni Herup Olsen, innkeypsleiðari í Rúsdrekkasølu Landsins, sigur, at tey meta, at sølan verður nakað tann sama í ár sum í fjør. Tað merkir, at føroyingar helst fara at keypa rúsdrekka fyri 8.245.197 krónur, tí so mikið brúktu føroyingar í Rúsdrekkasølu Landsins upp undir ólavsøku í fjør.

Hesar krónur vórðu býttar soleiðis, at 4.341.801 krónur fóru til spiritus, 2.411.091 krónur til øl og 1.492.305 krónur til vín. Fyri hesar pengar fingu føroyingar 95.046 litrar av øl, 22.279 litrar av víni og 19.596 litrar av spiritus.

Tilsamans 136.921 litrar av rúsandi løgi.

– Um eg persónliga skal gera nakrar viðmerking til innkeypsvanarnar í løtuni, so rokni eg við, at serliga sølan av cider fer at verða stór upp undir ólavsøku í ár, sigur Rúni Herup Olsen sum viðmerking til hagtølini.

## Drekka meiri vín

Í yvirlitinum hjá Rúsdrekkasølu Landsins verður cider bólkað undir vín. Tað sæst eisini aftur á hagtølunum, sum vit eisini prenta her á síðuni, tí í 2008 seldu tey væl meiri vín enn í 2007.

Harumframt minkaði sølan av bæði øl og spiritus frá 2007 til 2008.

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



MYND: ÁLVUR HARALDSEN